# Lena hitar upp fyri Beth Hart

Á 13 konsertum í november og desember fer okkara egna Lena at hita upp fyri kendu amerikansku songkvinnuna, Beth Hart, tá hon fer á tónleikarundferð í Danmark. Beth Hart hevur seinasta árið vunnið sær fleiri og fleiri fjepparar í Danmark. Og fyri stuttum vann hon Nielsens Musikkontrol Guld Pris, tí stakfløgan hjá henni, Learning to live, var spæld 10.000 ferð í donskum útvarpi í ár. Lena gevur í næstum fløguna »Can't erase it« út í Danmark, og eingin ivi er um, at henda rundferðin er frálík fyri marknaðarføringina av fløguni.

Fyrr í ár spældi Beth Hart á Nibe Festivalinum, og tá skrivaði ummælarin hjá Planet soleiðis: »Beth spældi klaver og gittar við sveittabroti, og samstundis helt hon øllum uppi við síni frálíku rødd. Í løtum minti hon um eina Janis Joplin í toppformi, og tí kann viðmælið um at lurta eftir Beth Hart bara fara víðari til lesararnar hjá Planet.fo - hon er verd at uppliva!«.

Tá Lena spældi á MjúS fyrr í summar skrivaði eg sjálvur: »Tað var ótrúligt at síggja, hvussu nógv Lena hevur ment seg seinasta árið, síðan hon helt útgávukonsert í sambandi við útgávuna av "Can't erase it". Serliga tá hon spældi løgini "Can't erase it" og "Catch 22" var menningin sjónlig.

Eitt er at hon er vorðin nógv meira pallvand, men eisini mátin, sum løgini vóru løgd til rættis, var frálíkur. Konsertin var annars merkt av nógvum nýggjum løgum, og tað var tíðiligt, at Lena og Niklas hava nógv upp á hjarta.«

So samanumtikið kunnu vit bara siga: Far á konsert tí Lena og Beth koma framvið nærhendis tær.



*Myndatekstur: Lena og Niklas vóru frálík á MjúS og vera ivaleyst frálík á rundferðini við Beth Hart*

*Mynd: Niels Uni Dam*

Hósdagin 10. november
Musikteatret í Vejle
Leygardagin 12. november kl.21.00 Tobakken í Esbjerg
Týsdagin 15. nov. kl. 20
Theater í Skive
Mikudagin 16. nov. kl. 20
Rytmeposten í Odense
Fríggjadagin 18. nov. kl. 20
Portalen í Greve
Leygardagin 19. nov. kl. 20
Viften í Rødovre
Mánadagin 21. nov.
Skraaen í Aalborg (útselt)
Hósdagin 24. nov.
Trommen í Hørsholm
Leygardagin 26. nov. kl. 20
Ny Ridehus í Næstved
Týskvøldið 29. nov.
Amager Bio í Keypmannahavn
Mikukvøldið 30. nov. kl. 20
Ringsted Kongrescenter í Ringsted
Hóskvøldið 1. desember
Train í Aarhus
Leygarkvøldið 3. desember
Sønderborghus í Sønderborg (útselt)

| | | | |
|---|---|---|---|
| Wed Nov 30 | Ringsted | DK | Ringsted Kongrescenter<br>Time: 20.00 |
| Thu Dec 1 | Aarhus | DK | Train |
| Sat Dec 3 | Sonderborg | DK | Sonderborghus<br>SOLD OUT |

## 70'ára dansur í Tvøroyrar Klubba

Fríggjakvøldið borðreiða Deiggj við dansivinarligum 70'ára tónleiki í Tvøroyrar Klubba. Hetta er fyrstu ferð síðan á jóansøku, at Deiggj spæla á heimavølli. Hetta er kvøldið fyri, at nýggi smyril kemur, so tiltakið skal síggjast sum eitt slag av upphiting.

Á jóansøku spældu Deiggj sum Gasolin Jam, og fleiri av gomlu Gasolin hittunum verða at hoyra fríggjakvøldið, men eisini løg hjá øðrum kendum 70'ára bólkum bæði útlendskum og føroyskum. Umframt hetta verða eisini nøkur nýggjari løg á skránni og sjálvandi nøkur heimagjørd løg.

Dentur verður lagdur á eina fjølbroytta og lívliga skrá við kendum dansivinarligum rockløgum og eitt hugnaligt kvøld í Klubbanum. Dansikvøldið er ament við 18 ára aldursmarki. Væntandi verða nógv fólk í býnum í sambandi við, at nýggi Smyril kemur til Tvøroyrar leygardagin á middegi.

**nud**

# Skaðin er enn ikki uppgjørdur

**Á læraraskúlanum eru tey enn ikki liðug við at gera upp, hvussu umfatandi skaðin var, tá nakrir smádreingir í farnu viku framdu umfatandi herverk á Skúlan**

HERVERK
*Jákup Mørk*

Eini 15 tons av vatni vóru atvoldin til umfatandni skaðarnar, sum stóðust av herverkinum. Dreingirnir, sum framdu herverkið, høvdu tipt frárenslið á fleiri vaskum á skúlanum, og síðani vórðu 14 kranar tendraðir við fullari kraft.

Hetta varð gjørt um kvøldið, og tí var tað ikki fyrr enn morgunin eftir, at herverkið varð uppdagað, og tá var skaðin stórur.

Jóni Johannesen, sum er húsavørður á Læraraskúlanum, sigur, at tey enn ikki eru liðug við at gera upp, hvussu umfatandi skaðin er, men hann leggur dent á, at hesin er stórur.

– Vit hava sett nakrar avfuktarar upp, og enn koyra hesir við fullari kraft. Fyrr enn alt er turkað ordiliga, vita vit ikki við vissu, hvussu stórur skaðin er, tí eitt nú linoleum sæst millum lítið og einki á, fyrr enn hetta er tornað.

– Men vit kunnu so í øllum førum staðfesta, at loftið hevur tikið stóran skaða. Eina staðni er tað dottið heilt niður av nógvu vætuni, og eisini aðra staðni er tað heilt illa farið, sigur Jóni.

Tað varð mest sum alt fyri eitt staðfest, hvørjir dreingirnir vóru, sum høvdu framt herverkið, og teir hava eisini verið til avhoyringar hjá løgregluni. Enn ber tó ikki til at staðfesta, hvat víðari hendir í málinum.



*Í fleiri støðum er loftið heilt illa farið av nógvu vætuni, og einstaka staðni er tað dottið niður*

*Mynd: Jens Kr. Vang*